

*Mett verður at kanska vóru eini 1000 fólk til stevnuna. Fólk komu út hagar dagin fyri og hildu á at koma allan leygardagin og kvøldið við*



*Gekk alt væl á stevnuni, so mundið enda galið sunnukvøldið tá Froyur kom eftir ein bólki av íslendingum. Veðrið var av tí besta, men beint tá fólkini vóru komin umborð og leggjast skuldi frá landi, kom eitt óløgi sum fylti bátahylin. – Hetta kom púrasta óvart á, men tíbetur spældi alt væl av, sigur Bjarki Skúvadal, skipari á Froyi*

*Mynd: Anton Joensen*



*Búi Brattaberg spennir í við spennandi togtoganina. Hetta bøtti tó lítið, tí fugloyingar vunnu kappingina*



*Bæði fólk við tilknýti til Mykines og gestir aðrastaðni frá vóru til stevnuna*



*Endamálið við stevnuni er eisini at fólk skal fáa høvið at tosa saman. Í góðveðrinum liggur væl fyri hesum*





*Hóast tey á Stóra Dímun eru fáment, mannaðu tey kortini eitt lið til togtoganina. Her ger dímunarbóndin, Óla Jákup í Dímun sítt til at hansara lið vann. Teir máttu kortini lúta fyri fugloyingum*

